


*Føroysku tyrluskipararnir hava royndir alt frá oyðimarkarumráðum í Miðeystri til kavakløddu firðirnar í Grønlandi*




skipari, Head of Training og flogovasti, Hans Heri Jacobsen, skipari, Villads Bøgesvang, skipari og Fróði Waag, stýrimaður.

Tað eru ymiskir sáttmálar innan frálandavinnuna í Norðsjónum. Onkrir sáttmálar eru at flyta fólk av landi út á boripallar, meðan aðrir innibera at flyta fólk millum pallarnar. Arbeiðið hjá føroyingunum í Bel Air hevur fyri tað mesta verið umfatað av hesum seinna, men hava teir júst fingið ein triðja sáttmála, sum eisini fevnir um dagliga flúgving úr Esbjerg.

## Ein vanlig vakt

Fróði Waag greiðir her frá, hvussu ein vanlig vakt hjá føroysku tyrlumonnunum sær út: -Vit flúgva týsdag seinnapart úr Esbjerg út á Gorm feltið í Norðsjónum. Hetta liggur uml. 150 fjórðingar úr Esbjerg. Vit hava ein vanligan dag 12 ferðandi við okkum út. Komnir út á feltið, "shuttla" vit so millum einar 5 til 10 pallar, har fólk fara av og koma umborð.

# So leingi vit ikki hava funnið kolvetni í føroysku undirgrundini er tað ein gyltur møguleiki, at føroyingar framhaldandi kunnu nema sær neyðuga førleikan uttanlands.

FRÓÐI WAAG, TYRLUSKIPARI

Næstu vikuna búleikast vit so umborð á einum av pallunum á Gormfeltinum. Av tí at nógv fólk "búgva" á einum palli og arbeiða á einum øðrum, hevur tað við sær ein stóran tørv at flyta fólk millum hesar pallar. Eisini útbúðnaður, ið hevur skund, verður fluttur.

Vit flúgva 3 til 4 tímar hvønn dag í 7 dagar, og venda síðani nøsina aftur móti Esbjerg, har vaktarskifti er. Flúgvingin í Norðsjónum er avgjørt ein avbjóðing til tíðir. Norðsjógvurin bjóðar ikki altíð uppá besta veðrið, serliga á hávetri, har so at siga øll flúgving er myrkaflúgving.

Ein annar sáttmáli, Bel Air hevur fingið, er flúgving í Eystursjónum. Talan er eisini her um frálandaflúgving. Tó snýr hendan flúgvingin seg um manningarskifti til eitt risastórt rørleggingarskip. Fyri at nøkta orkutørvin, keypa londini í Europa á hvørjum ári stórar nøgdir av gassi úr Ruslandi. Men ikki hevur altíð verið líka lætt at fingið fatur á hesum gassinum, tá russar onkuntíð hava hótt við at skrúva fyri, orsakað av væntandi gjaldføri frá onkrum av londunum á vegnum. Hetta tykist nú ein loysn at síggjast á. Fyri at útvega eina beinleiðis veiting, er avgjørt at leggja eina gassleiðing úr Ruslandi niður gjøgnum Eystursjógvin til Týskland. Arbeiðið hevur vakt til mikla umrøðu og hevur verið høgt uppi at venda politiskt. Men ein sannroynd er, at heimsins stórsta rørleggingarskip "Solitaire" í oktober kom í finskan sjógv áleiðis úr russiskum sjógvi.

Tá skipið leypandi skal skifta ein part av manninginiút, tí ikki ber til at fara í havn uttan víðari, fekk Bel Air uppgávuna. Onnur tyrlan hjá Bel Air varð leasað inn úr Hollandi og flýgur í dag frá Helsinki til Solitaire, sum fyri tíðina liggur stutt úr landi. Men túrarnir gerast nú longri og longri, so hvørt sum skipið flytir seg niður gjøgnum Eystursjógvin. Skipið liggur nú uml. 100 fjórðingar ella 45 min. úr Helsinki.

## Klárir til føroyska oljuvinnu

Bel Air Aviation hevur sum sagt í dag tvær tyrlur, meðan tann triðja er á veg. Triðja tyrlan er júst komin, meðan felagið bíðar eftir, at fjórða AW139 tyrlan verður leverað. Hetta sigur so mikið at arbeitt verður alla tíðina við at útvega nýggjar sáttmálar. Og her hevur tað víst seg, at AW139 tyrlan saman við royndum og ikki minst fleksiblum starvsfólki, hevur givið felagnum ein góðan byr.

Fróði Waag vísir á, at hetta er ikki fyrstu ferð, at nógvir føroyingar arbeiða saman uttanlanda. Í 2008 flugu heilir 5 føroyskir tyrluskiparar hjá Qatarska felagnum Gulf Helicopters, har onkur teirra framvegis starvast. Føroyingar eru sostatt at finna innan næstan allar vinnur, nógva staðni í heiminum og hava flogið við so at siga øllum avbjóðingum. Frá oyðimarkarumráðum í Miðeystri til kavakløddu firðirnar í Grønlandi. Føroyingar eiga tí allan kunnleikan til eina møguliga komandi frálandavinnu í Føroyum, skuldi hetta blivið veruleiki í nærmastu framtíð heldur Fróði Waag.

- Men so leingi vit ikki hava funnið kolvetni í føroysku undirgrundini er tað ein gyltur møguleiki, at føroyingar framhaldandi kunnu nema sær neyðuga førleikan uttanlanda, bæði innan flúgvingina sjálva, og ikki minst innan aktuellu typurnar, ið nýttar verða. Skuldi tað hent, at kolvetni verður funnið í føroysku undirgrundini, ivist eg onga løtu í, at vit eiga væl kvalificerað fólk, ið ført er fyri at lyfta uppgávuna.

*jan@sosialurin.fo*



*Gott veður í Norðsjónum í summar....*




*Innan frálandavinnuna er AW139 høgt í metum. Tyrlan er vanliga útgjørd til at taka 12 ferðafólk, men hevur møguleika at taka 15.*



*Til tíðir liggja fleiri pallar lið við lið. Her eru teir lendir á grannapallinum "Safe Esbjerg"*